Serbia tørv á meiri pengum

Serbia fekk herfyri 520 milliónir evrur í láni frá Altjóða Gjaldoyragrunninum IMF, men tað var ikki nóg mikið, og tí hevur landið nú søkt grunnin um at sleppa at læna tvær milliardir evrur afturat, skrivar BBC. Grundgevingin hjá stjórnini í Beograd er, at altjóða fíggjarkreppan hevur rakt landsins búskap meinari, enn roknað varð við. Eygleiðarar vænta, at IMF fer at seta serbisku stjórnini hørð krøv fyri at lata lánið. Eitt nú fer grunnurin væntandi at krevja, at tær almennu útreiðslurnar skulu skerjast munandi.

Á aðalfundinum hjá Atlantic Petroleum komandi leygardag, er felagið í einari støðu, sum tað ikki hevur verið í áður: Tað manglar nógvar pengar og kann samstundis staðfesta, at kursurin er munandi lægri enn hann var á seinasta aðalfundi

Tað sær svart

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum hevur brúk fyri so nógvum pengum í ár, at tað eru tey, sum seta spurnartekn við, um felagið fer at yvirliva. Morten V. Langer, blaðstjóri og partabrævagreinari, sigur at felagið er í vanda fyri at fara, um verandi lángevarar ikki leingja sínar avtalur. Og grannskoðarin hjá felagnum, Inpact, hevur kent tað neyðugt at seta eina álvarsliga ískoytisupplýsing í roknskapin. Stjórin Wilhelm Petersen sigur hinvegin, at felagið er sterkt, og fer at megna at umfíggja skuldina sum einki

OLJUVINNA

Leif Láadal

Tá Atlantic Petroleum fyri nøkrum árum síðani hevði eina lýsingarherferð fyri partabrøvum í felagnum, var herrópið: "Tað sær svart út". Hesi orð passa betri enn nakrantíð til felagið, sum bæði hevur ryggin ímóti múrinum í sambandi við umfígging av lánum, ið fella til gjaldingar í ár, og samstundis fyri stuttum byrjaði at framleiða tað svarta gullið: Oljuna.

Øðrvísi støða

Tá nevndarformaðurin í oljufelagnum Atlantic Petroleum komandi leygardag fer at bjóða vælkomin til aðalfund felagsins, er hann í einari støðu, sum hann ongantíð hevur verið í áður. Fyri tað fyrsta, er felagið fyri fyrstu ferð trongt reint fíggjarliga, og harnæst er tað fyrstu ferð, at kursurin á partabrøvunum er lægri enn á aðalfundinum árið fyri.

Atlantic Petroleum hevur í løtuni ryggin ímóti múrinum, og skal út á lánimarknaðin eftir 410 miliónum krónum næstu níggju mánaðirnar, bara fyri at umfíggja verandi lán. Harafturat hevur felagið brúk fyri 90 miliónum krónum til útbygging og leiting. Pening, sum tó sær út til at kunna fíggjast við peningastreyminum hjá felagnum.

At skula finna eina lítla hálva milliard krónur á einum lánimarknaði, sum er píndur niður av einari altjóða fíggjarkreppu, er ikki bara sum at siga tað, og tað veit Kjartan Hoydal, nevndarformaður í Atlantic Petroleum. Tí nevnir hann eisini fleiri staðni í skrivaðu formansfrágreiðingini, sum er almannakunngjørd í sambandi við roknskapin, broyttu umstøðurnar. Orðingar sum "avbjóðandi fíggjarliga umhvørvið" og "nýggi fíggjarligi hugburðurin" verða lagdar afturat, tá tosað verður um verandi støðu og arbeiðið, sum liggur fyri framman.

Felagið í vanda

Nakni veruleikin hjá einum oljufelag, sum skal út at umfíggja frá stuttfreistaðum lánum til langfreistað, er tann, at bara reinar inntøkur kunnu brúkast sum argument yvirfyri lánveitara. Fara vit bara tvey ár aftur í tíðina, bar eisini til at hyggja at øðrum virðum í oljufeløgunum – eitt nú leitiloyvum. Í dag er tað "cool cash", tað snýr seg um, og Atlantic Petroleum er í teirri hepnu støðu, at felagið hevur inntøkur, og sambært stjóranum, Wilhelm Petersen, fara hesar inntøkur at veksa nógv næstu tíðina.

Men sjálvt um Atlantic Petroleum hevur inntøkur, og fer at fáa enn fleiri um ikki so langa tíð, so eru fleiri sum seta spurnartekn við møguleikarnar at halda fram – í hvussu so er so, sum felagið er sett saman í løtuni. Ein av teimum er Morten V. Langer, búskaparfrøðingur og blaðstjóri á m.a. Aktieugebrevet. Hann sigur við Sosialin, at tað skulu heilt serlig kort á borðið fyri at sleppa at umfíggja skuld í hesum døgum.

- Tað eru bara inntøkur, sum telja, og hevur felagið ikki nóg nógvar av teimum, so er eingin kjansur, at útlendskir bankar ella lánveitarar vilja nerta við Atlantic Petroleum, sigur hann.

- Við oljuvirðum, sum samlað bara svara til tað, sum felagið skal út at umfíggja, er kjansurin ikki góður fyri at fáa útlendskar bankar at taka yvir føroysku lánini, so møguleikin fyri, at føroysku bankarnir geva Atlantic Petroleum ein skoða, er kanska einasti møguleiki í løtuni, sigur hann.

Hesum avvísir Wilhelm Petersen blankt.

- Vit hava bara bíða eftir at okkara næsta felt skal fara undir framleiðslu, og nú er so klárt at fara í holt við umfiggingina av álvara, og hon fer at ganga gott, lovar hann og leggur afturat, at tað sær gott út við møguleikum at umfíggja føroysku

> *»At føroysku bankarnir geva Atlantic Petroleum ein skoða, er kanska einasti møguleiki, sum felagið hevur í løtuni.«*
>
> *Morten V. Langer, partabrævagreinari og blaðstjóri*